

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 04 - 2013

# Løgmaður hitti nýggja grønlendska landsstýrið

Grønlandsvitjanin hjá eini føroyskari sendinevnd við løgmanni á odda er at enda komin. Undir vitjanini hevur løgmaður eisini havt fundir við næstforkvinnuna í grønlendska landsstýrinum, Miiti Lynge og vinnumálaráðharran, Jens-Erik Kirkegaard, sum eisini umsitur ráevnis- og oljumál. Løgmaður kunnaði seg um raðfestingarnar hjá nýggju stjórnini, og partarnir umrøddu møguleikarnar fyri vinnuligum og fyrisitingarligum samstarvi landanna millum. Grønlendska landsstýrið raðfestir høgt at gagnnýta alt náttúrutilfeingið, bæði ráevni og havtilfeingi, á burðardyggan hátt. Vinnumálaráðharrin vísti áhuga í oljuleitingini í føroyskum sjóøki, serliga í boring gjøgnum basaltfláir. Grønland ynskir sum Føroyar at menna ferðavinnuna, og eisini varð vístur áhugi fyri tættari samstarvi um at fáa fleiri ferðafólk til Føroya og Grønlands skrivar heimasíðan hjá løgmansembætinum. Løgmaður kemur aftur til Føroya tann 19. apríl. (Myndatekstur: Løgmaður og Miiti Lynge.) Og Jens Erik Kirkegaard, vinnumálaráðharri